

Landsgrannskoðarin heldur, at ein fløkt almenn umsiting ger, at almenn kt-trygdin er vánalig. Skal kt-trygdin fáast upp á pláss, má almenna umsitingin samstundis gerast greiðari og betri

# Teldutrygdin er spegilsmynd av fløktari landsumsiting

**Ein yvirskipaður kt-trygdarpolitikkur kann ikki verða gjørdur, uttan at almenni bygnaðurin verður endurskoðaður og effektiviseraður. Tað heldur Landsgrannskoðarin, sum heldur at vantandi teldutrygd vera eitt stórt vandamál**

TELDUTRYGD
*Eyðun Klakstein*

Nú er eitt uppskot gjørt um, hvussu almenna umsitingin í Føroyum fær eina betri stýring av sínum teldum og telduskipanum.

Tað er KT-Forum, sum er mannað við umboðum úr øllum aðalráðnum, ið hevur gjørt uppskotið, og tað skal leggjast fyri aðalstjórarnar seinni í hesum mánaðinum at taka støðu til.

Arbeiðið hjá KT-Forum botnar í, at nógvar ákoyringar hava verið ímóti, hvussu landið umsitir mongu telduskipaninar hjá sær.

Ein av teimum, sum fleiri ferðir hevur funnist at kt-politikkinum hjá landinum, er Landsgrannskoðarin, og Leivur Harryson og hansara fólk trivu aftur í hetta mál í seinastu frágreiðing síni, sum varð gjørd í fjør.

## Miðsavna fleiri uppgávur

Landsgrannskoðarin vísir á, kt-bygnaðurin hjá landinum er tað størsta vandamálið, tá ið tað ræður um kt-trygd.

– Í dag hevur landsumsitingin eitt ótal av KT-skipanum, og tíðum hava alt ov smáar umsitingarligar eindir ábyrgd av at keypa, broyta, halda við-líka, menna og reka skip-anir, umsita net og trygd, sigur Landsgrannskoðarin í frágreiðing síni.

– Óneyðuga nógvir stovnar mugu tí hava starvsfólk, sum hava kunnleika til kunningartøkni, og torført er at fáa skikkað fólk. Hjá dugnaligum fólki við royndum stendur ofta annað starv í boði. Tá ið eindirnar eru smáar, verða stovnarnir ofta hart raktir, tá ið fólk skifta arbeiði. Nógvar leiðslur megna ikki at taka á seg ábyrgdina av KT-skipanum, og verða uppgávurnar tí ofta uttan neyðuga leiðslustýring latnar privatum veitarum uppí hendi.

Landsgrannskoðarin heldur, at tað er neyðugt at endurskoða kt-bygnaðin og fáa tamarhald á støðuni.

– Helst verður neyðugt at miðsavna fleiri uppgávur fyri at bøta um trygdina, sigur Landsgrannskoðarin

## Spegilsmyndin

Men tá ið tosað verður um teldutrygd hjá landinum, ber ikki til at tosa um hetta mál, uttan at koma inn á sjálva bygnaðin fyri almennu umsitingina.

– Almenni KT-bygnaðurin kundi verið væl betri skipaður og samskipaður, men hann er í stóran mun ein spegilsmynd av einum undirliggjandi bygnaði. Broytingar innan lógarverkið, roknskaparverkið, uppgávubýtið millum aðalráð, stovnar, millum land og kommunu, millum landsstovnar og meira ella minni almennar grunnar eru oftast farnar fram uttan nakað yvirskipað endamál, og tí er KT-bygnaðurin og KT-trygdin hareftir, heldur Landsgrannskoðarin.

Landsgrannskoðarin sigur, at ein yvirskipaður kt-politikkur og kt-trygdarpolitikkur ikki kann verða gjørdur, uttan at almenni bygnaðurin verður endurskoðaður við tí enda-máli at effektivisera um-sitingina – tað vil siga gera hana bíligari og betri.

Dømi um fløkta umsiting Landsgrannskoðarin vísir í sínari frágreiðing á, at landið hevur nógvar fløktar skipanir, sum ikki hanga nóg væl saman.

– Fleiri stovnar ella grunnar umsita uppgávur, sum helst í størri mun kundu verið samskipaðar. Til dømis er eitt ótal av stovnum, grunnum, deildum og øðrum, sum hvør sær umsita lønir. Fýra fyrisitingarligar eindir umsita dagpening vegna sjúku og barnsburð. Al-manna-stovan, ALS og Lønjavningarstovan umsita veitingar vegna vantandi arbeiðsinntøku, sigur Landsgrannskoðarin og nevnir onnur dømi um fløkta umsiting.

– Hóast talan er um lutfalsliga smáar eindir, nýta almennir stovnar og grunnar nógvar ymiskar telduskipanir til at gjalda út, føra bókhald, umsita lønir, lán og annað. Tá ið uppgávurnar eru so spjaddar, er ofta torført at manna størv við fólki, sum hevur førleika og neyðugar royndir.

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at almenna umsitingini er effektiviserað seinnu árini, og hann heldur, at tørvur er á at endurnýggja fleiri búskapar-skipanir. Fer hetta arbeiði ikki fram sum liður í eini yvirskipaðari heildarætlan, har eisini bygnaðurin verður endurskoðaður, verður pengingur og starvsfólkaorka ikki nýtt á skynsaman hátt.

## Smáar eindir

Landsgrannskoðarin heldur eisini, at ein trupulleiki við almennu umsitingini, sum førir við sær vantandi teldutrygd, er, at nógvar smáar umsitingareindar eru.

– Fyri at ein almennur stovnur skal virka, eru ávís umsitingarlig minstukrøv. Stovnurin skal hava samskiftismøguleikar bæði innanhýsis og uttanhýsis, og tað skulu starvsfólk til fyri at halda hetta við líka. Smærri stovnar, sum húsast einsamallir og hava sína egnu fyrisiting, eru sera dýrir at umsita, og binda óneyðuga nógva starvsfólkaorku til at loysa lutfalsliga sera smáar umsitingaruppgávur.

– Tá ið eindirnar eru so smáar, verða stovnarnir ofta hart raktir, tá ið starvsfólk skifta arbeiði. Tað kann hava við sær vantandi siðvenju og vantandi upplæring av nýggjum starvsfólkum, sum tí ikki verða nóg dugnalig.

Landsgrannskoðarin heldur, at tað kundi verið vert at kanna, um tað ikki hevði loyst seg at savna stovnar, grunnar og fyrisitingar í størri eindir í nýmótans umsitingarbygningum, møguliga saman við kommunalum fyrisitingum, fyri at effektivisera umsitingaruppgávurnar og loysa starvsfólkaorku til tær grundleggjandi uppgávurnar.






















Stuttan boðskap til fólkið
- siga lýsingaserfrøðingarnir

Her hevur tú møguleikan at fáa tín boðskap fram,
fyri ein bíligan pening. Ring til Duritu ella Finnbjørg

Sosialurin

ARGJAVEGUR 26 · FO-160 ARGIR · TEL 341800 · FAX 341801 · WWW.SOSIALURIN · POST@SOSIALURIN.FO